# Ársins kvinna og maður og kjakvirðisløn

VIRÐISLØN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Fyri triðju ferð á rað fer Miðlahúsið saman við Føroya fólki nú aftur at kjósa Ársins kvinnu og Ársins mann og lata ársins kjakvirðisløn. Uppskot skulu vera Miðlahúsinum í hendi í seinasta lagi mikudagin 27. februar. Vikuna eftir tvs. mikudagin 5. mars verður so hátíðarhald í Miðlahúsinum, har virðislønirnar verða handaðar.

Fyrstu ferð hesar virðislønir vórðu latnar var í 2006, og tá fóru tær til: Leilu Solmunde, Sofus Olsen og Óla Petersen. Í 2007 fóru tær til Ellu Müller, Birgir Enni og Amnesty International, Føroya deild.

Grundgevingarnar fyri at lata umrøddu virðislønir eru allar umrøddar í lýsing aðrastaðni í blaðnum í dag. Tvær dómsnevndir taka avgerð um, hvat av innkomnu uppskotunum fær virðisløn. Føroya Banki stuðlar tiltakinum.



*Fersðut ferð Ársins kvinna ogÁrsins maður vórðu kosin, var í 2006, tá Leila Solmunde og Sofus Olsen, sáli, fingu heiðurin*




# Sosialráðgevi
## til barnaverndartænastuna

Á sosialu deild kommununar er eitt fulltíðarstarv sum sosialráðgevi í barnaverndartænastuni leyst at søkja.

Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og verða útintar í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini á deildini og aðrar viðkomandi samstarvspartnarar.

### Vit bjóða

- eitt áhugavert og avbjóðandi starv bæði fakliga og persónliga.
- møguleika fyri at menna teg fakliga.
- eina vælvirkandi deild, har strembað verður eftir, at arbeiðið verður gjørt á einum fakliga høgum støði

Sosiala deild er partur av trivnaðarfyrisitingini og umsitur tey málsøkir, sum sambært galdandi lóggávu eru løgd til kommununa at umsita.

### Deildin

Á sosialu deild starvast 5 sosialráðgevarar, 3 skrivarar, ein sálarfrøðingur umframt deildarleiðari. Eisini er eitt toymi við 6 familjuráðgevum knýtt at deildini. Deildin skal í næstum flyta í høli saman við Barna- og ungdómsdeildini, ið veitir pedagogiska ráðgeving til dagstovnarnar í kommununi.

### Setanarviðurskifti

Starvið verða sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

### Meira fæst at vita

um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, deildarleiðara, telefon 30 20 10.

### Umsókn

saman við upplýsing um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 25. februar 2008. Merkið umsóknina »Sosialráðgevi«.

**Tórshavnar kommuna**